## Dreingir, ið spæla við dukkur

Ein av nýggju útgávunum hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags, er Regin og barbidukkurnar. Regin dugir væl at spæla fótbólt, og pápi Regin vil helst hava, at Regin spælir fótbólt. Men viðhvørt vil Regin heldur spæla dukkur við gentunum í barnagarðinum ella sleppa at lata seg í fínar kjólar og dansa. Her er talan um viðkomandi søgu um, at ansa eftir ikki altíð at taka alt sum givið, og at tað kann vera trupult hjá einum drongi at sleppa at spæla dukkur við gentunum. Men spakuliga verður Regin góðtikin sum líkaverdur spælibróðir. Hinir dreingirnir skilja einki í fyrstani, men so finna teir útav, hvussu stuttligt tað er at dansa. Rithøvundurin Pija Lindenbaum hevur skrivað og myndprýtt fleiri góðar bøkur um børn. Á føroyskum er eisini útkomin: Tá ið mamma Áka varð í ørviti, sum kom út í 2006.



## Nýtt frá Philip Pullmann

Eg var ein rotta er nýggj bók eftir enska høvundin, Philip Pullmann. Hon er um ein drong, ið ein dag kemur til eini gomul hjún, og sigur seg hava verið rotta. Hann ber seg øðrvísi at, og tí fara søgur at ganga um hann, og hvat hann í veruleikanum man vera. Á odda fyri søgunum er blaðið Koyrilin, sum spinnur ein góða søgu burturúr og fær fólk á gos um, hvør hesin løgni drongurin man vera: Eitt ræðuligt skrímsl? Ein vanskapningur? Ein løgin snigil? Ella er hann bar ein vanligur drongur, sum ber seg øðrvísi at?

# Tað kann bara blíva betri

**- Eg trúgvi upp á, at tað kann bera til at fáa betri skil á, sigur Jarvin Feilberg Hansen, formaður í pedagogfelagnum**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað var rættiliga stór undirtøka fyri fundinum, sum fíggjarmálaráðið hevur kallað fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum saman til fyri at fáa samráðingarnar at ganga so smidliga sum gjørligt. Her lurta tey eftir Snorra Fjallsbak, leiðara á lønardeildini á fíggjarmálaráðnum*

- Hetta er ógvuliga positivt.

Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum, sigur, at tað var eitt gott tiltak, tá ið Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, í gjár kallaði øll fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum á fund at tosa um nýggju sáttmálasamráðingarnar, sum skulu verða næsta ár.

Men hinvegin, so kann tað bara blíva betri, leggur hann afturat.

### Leggja lunnarnar

Sáttmálarnir hjá teimum almennu fakfeløgunum ganga ikki út fyrrenn 1. oktober næsta ár men hóast tað ikki er fyrrenn um hálvtannað ár, ætlar landsstýrismaðurin longu nú at taka tey fyrstu stigini fram ímóti samráðingunum.

Tí bað hann øll fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum koma á fund í gjár.

Á fundinum umrøddu tey, hvussu sáttmálasamráðingar kunnu samskipast á besta hátt og partarnir tosaðu um, hvussu ásetingarnar í sáttmálunum kunnu gerast greiðari og einfaldari.

Hetta hevði gjørt tað lættari hjá stovnum, lønardeildini hjá fíggjarmálaráðnum og fakfeløgum, at umsita sáttmálarnar.

### Kann bara blíva betri

-Tað er frálíkt, at landsstýrið tekur stig til at hitta fakfeløgini at tosa saman í friði og náðum í friðartíð, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

Tað vóru eini 60 fólk á fundi og formaðurin í Pedagogfelagnum heldur, at støðan kann bara blíva betri, tí tað vanliga er, at sáttmálasamráðingarnar stjala ómetaliga nógva tíð.

- So ber tað til at semjast um ein framferðarhátt, sum gera samráðingarnar einfaldari, er tað avgjørt ein fyrimunur.

Men eitt endamál við hesi tilgongdini er at gera samráðingarnar einfaldari og kanska onkusvegna samansjóða tær, har orðingar í teimum ymsu sáttmálunum líkjast og at finna felags orðingar fyri fleiri av sáttmálunum

### Tíðina fyri okkum

Jarvin Feilberg Hansen sigur, at á fundinum tóku tey fyrsta stigið til at fyrireika næstu sáttmálasamráðingarnar og mitt í summar skulu partarnir hittast aftur.

Tá skulu fakfeløgini siga sína hugsan um, hvussu tey kundu hugsa sær, at samráðingarnar verða skipaðar.

- Nú hava vit tíðina fyri okkum og tað kann væl henda, at okkurt gott spyrst burtur úr hesum.

Men nú hevur slíkt verið upp á tal fyrr, men tað er hvørja ferð enda við, at partarnir kortini sita í síðstu løtu?

- Ja, men tað, sum er farið, kunnu vit ikki brúka til so nógv. Nú eru nógv nýggj fólk í teimum ymsu nevndunum og eg merkti, at rættiliga góð undirtøka er fyri hesi mannagongdini. Og sjálvur havi eg so ikki roynt hetta fyrr, sigur Jarvin Feilberg Hansen.

- Eg havi álit á, at hetta ber til, tí nú hava tær ymsu felagsnevndirnar eisini høvi til at siga sína hugsan um, hvussu samráðingarnar skulu skipast.

### Ikki eitt orð um lønarhækking

Hinvegin gjørdi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt, at lønarkrøv og lønarkarmar vóru ikki mál, sum skuldi viðgerast á hesum fundinum og tað varð heldur ikki tikið upp á tunguna.

Tey nevndu heldur ikki útsøgnina frá løgmanni um, at allar lønarhækkingar næsta ár skulu takast inn aftur í sparingum, tí almennu útreiðslurnar skulu ikki hækka næsta ár.

Løgmaður segði somuleiðis, at ongin kundi droyma um at lønirnar skuldu hækka aftur næsta ár, men heldur ikki hetta varð nevnt á fundinum.

Hinvegin varð eisini tosað um at gera eitt veruligt og haldgott hagtalsgrundarlag at føra samráðingarnar út frá.

- Kundu báðir partar samst um eitt halgtalsgrundarlag at ført samráðingarnar út frá, hevði tað hevði verð ein stórur fyrimunur fyri samráðingarnar, sigur formaðurin í Pedagogfelagnum.

### Fremja sáttmálarnar

Annars staðfestir hann, at bøtast kann um korini upp á nógvar ymsar mátar.

- Eitt nú er nógv ymisk protokollat tengd at sáttmálunum um eldrapolitikk, seniorpolitikk. Felags lønartalvur o.s.fr, og ein máti kundi verið at lagt størri dent á at sett tey verk.

Annars vísir Jarvin Feilberg Hansen á, at einaferð í tíðini hava lønirnar eisini verið prístalsreguleraðar, men hann leggur dent á, at heldur ikki hesin spurningurin hevur verið til umrøðu yvirhøvur.

- Vit fara avgjørt upp í hetta samstarvi við opnum sinni, leggur hann afturat.



*Jóannes Eidesgaard greiðir almennu fakfelagsfólkunum frá, hvussu hann kundi hugsað sær, at sáttmálasamráðingar skulu skipast. Eg havi álit á, at tað verður betri, sigur formaðurin í Pedagogfelagnum*